

*Uisge Gorm fyrrverandi Mærsk tangaskip, nú umbygt til oljuskip til oljufeltið Fife í Norðsjónum, her á skipasmiðjuni McNulty í New Castle*

*Vanlig sjón á Føroyar-Hetlandsleiðunum í framtíðini:*

# Oljuskipið avloysir oljupallarnar

*Tað verða ikki stórir oljupallar, sum standa á botni, ið vit fara at síggja á leiðunum millum Føroyar og Hetland í framtíðini. Tað verða harafturímóti serútgjørd oljuskip, sum fara at vera kjarnin í oljuvinnuni í hesi nýggju oljuprovinsini*

FPSO verður nýggja skipanin, sum skal avloysa oljupallarnar, nevnd millum oljufolk. Og tað er stytting av ensku orðunum "Floating production, storage and offloading" ella á okkara máli "Flótandi framleiðsla, goymsla og avskiping".

Skipanin hevur longu verið í brúki í nøkur ár, men tað er nústaðni nú, at hon hevur fingið týdning fyri oljuvinnuna.

Fyri útlitini hjá eini oljuvinnu vestan fyri Hetland er henda skipanin einki minni enn ein fortreyt. Tað er nevniliga ikki hugsingur um at gera íløgur í stórar fastar oljupallar í hesum nýggja økinum.

Talan er um eitt skip, sum hevur nærum somu uppgávur sum verandi oljupallar.

Loysunarorðið fyri hesa nýggju skipan er tað teir rópa á oljumáli "costreduction" ella útreiðsluminking.

Nú bílig olja úr Ruslandi og øðrum londum floymir inn á marknaðirnar og nú oljuprísirnir tykjast at falla er tað altavgerandi fyri oljuvinnuna í eitt nú Norðsjónum og ikki minst fyri komandi oljuvinnuna vestan fyri Hetland, at bæði íløgu- og rakstrarútreiðslur kunnu minkast mest møguligt.

Skal vinnan vera kappingarfør við avbjóðingina eystanífrá og frá lækkandi oljuprísunum er rætt og slætt lívsneyðugt at gera alt bíligari. Og hetta gerst m.a. við at menna tøknina.

Eitt av stigunum hesi tøkniligu menning er oljuskipið, sum so við og við heilt fer at avloysa teir stóru og kostnaðarmiklu oljupallarnar.

Í farnu viku var nýggjasta oljuskipið navngivið og gjørt klárt at fara á fyrstu ferð sína út til oljufeltið Fife í Norðsjónum.

Við til hendingina vóru flestu av mest royndu olju journalistunum í Bretlandi umframt umboð fyri Útvarp Føroya og Tíðindablaðið Sosialin.

**Fyrrverandi Mærsk-skip**

Talan er um fyrrverandi danska tangaskipið Dirch Mærsk sum varð bygt í Odense fyri 10 árum síðani.

Umbyggingin hevur gingið við rúkandi ferð.

Skipið varð keypt í oktober í fjør og er síðani umbygt til at virka sum flótandi oljuverksmiðja, goymsla og avskipingarstøð.

Tað er hálendska fyritøkan Bluewater, sum stendur fyri øllum arbeiðinum og sum eisini eigur skipið. Sáttmáli er so gjørdur við stóra oljufelagið Amerada Hess, sum hevur leigað skipið til at taka sær av framleiðsluni frá nýggju oljukelduni Fife í Norðsjónum.

Amerada Hess hevur havt sera góðar royndir við oljuskipum. Oljuskipið Petrojarl hevur í nøkur ár staðið fyri framleiðsluni á Hudson-feltinum.

Nú tær stóru oljukeldurnar eru við at tømast eru oljufeløgini farin at vísa teimum smærri keldunum, sum ongantíð hava verið

➤➤



*Allur tann fremsti parturin av skipinum er nú verksmiðja*

